# Sjúkrasystir fer at vitja gomul í Havn

**Nú fáa tey gomlu í Havn eitt nýtt tilboð. Tey, sum vilja, kunnu fáa eina sjúkrasystir á vitjan av og á**

HEIMAVITJAN
*Áki Bertholdsen*



*Skjótt fer tað at bera til hjá gomlum í Havnini at fáa vitjan av sjúkrasystir av og á. Kanningar aðrastaðni vísa, at hetta hjálpir munandi um heilsustøðuna. Myndin er tilvildarlig*

Gongst sum ætlað, fáa tey gomlu í Havn skjótt eina nýggja tænastu. Tey, sum vilja, kunnu fáa eina sjúkrasystir á vitjan av og á. Tá ið fíggjarlógin hjá Tórshavnar Kommunu var til viðgerðar, setti minnilutin í býráðnum uppskot fram um at seta eina heimavitjan til eldri á stovn til tey eldru í kommununi og mælti samstundis til at seta 400.000 krónur av til endamálið, so at ein sjúkrasystir kundi verða sett í starv at røkja tænastuna.

Uppskotið var einmælt samtykt á býráðsfundi.

Elin Lindenskov, sum førdi orðið fyri minnilutan í hesum máli, sigur, at hon hevur biðið um at málið kemur til viðgerðar á næsta fundi í sosialu nevnd hjá býráðnum, so arbeiðið kann byrja at leggja skipanina til rættis og tað hevur hon fingið játtað.

## Fyribyrgjandi vitjan

Hon sigur, at hetta er ein nýggj tænasta, har tey gomlu í Tórshavnar Kommunu, sum vilja, kunnu fáa eina sjúkrasystir á vitjan av og á.

Fyrrenn skipanin er løgd til rættis, ber ikki til at siga, hvussu hon verður skipað, men ætlanin er, at hendan sjúkrasystirin skal vitja tey gomlu í kommununi, sum vilja hava hana, eina, kanska tvær ferðir um ári.

Enn er heldur ikki avgjørt, um tað verður tey gomlu yvir 80 ár, ella yvir 75 ár, sum fáa hetta tilboðið, ella um aldursmarkið verður eitt annað.

Men í øllum førum væntar og vónar hon, at skipanin fæst at virka í ár.

Elin Lindenskov sigur, at hetta er eitt fyribyrgjandi tiltak, sum kann forða fyri nógvum trupulleikum, bæði hjá teimum gomlu og, ikki minst, eisini hjá heilsuverkinum.

– Fáa tey gomlu eina sjúkrasystir á vitjan av og á, kann hon fáa eyga á heilsuligar ella sosialar trupulleikar hjá teimum. Og við at seta tiltøk í verk, kann sjúkrasystirin sostatt eisini forða fyri, at trupulleikarnir vaksa seg størri.

Hon sigur, at hetta tiltakið er í samsvari við eldraálitið, sum Tórshavnar Býráð gjørdi í 1999, har ein slík vitjunartænasta verður umrødd.

Tá gjørdi Býráðið eina kanning, sum vístu, at 23% av øllum gomlum, sum búðu heima, hildu, at tað hevði verið gott at fingið eina fyribyrgjandi vitjan, tá ið ein er blivin 80 ár. Summi hildu, at tað átti at verið fyrr, kanska frá tí at tey eru 75 ár.

– Tey, sum hildu, at tað hevði verið gott við eini slíkari heimavitjan, vistu ikki altíð, hvagar tey skuldu venda sær, um onkur trupulleiki skuldi stungið seg upp, tað kann vera alt møguligt, eitt hoyriapparat, sum skal stillast, einar brillur, sum skulu rættast, ella okkurt heilt annað. Tey hugsað eisini um grannar, vinfólk og skyldfólk, tí tað var ikki altíð, at tey fingu upp í lag at biðja um hjálp og tá hevði tað verið gott, um onkur kundi stokkið inn á gólvið av og á.

## Sera góðar royndir

Í Danmark er slík vitjunartænasta sett á stovn við sera góðum úrsliti. Ein kanning, sum er gjørd í Rødøvre vísti, at eftir at hendan skipanin var sett í verk, vórðu 19% færri løgd inn á sjúkrahús, dagarnir í seingini lækkaði 24%, 31% færri fluttu á røktarheim læknavitjanirnar blivu heili 50% færri í tali.

– Hetta kundi tískil eisini verið ein munandi fyrimunur fyri sjúkrahús, røktar- og ellisheim, sum eru ógvuliga ovbyrjað sum er.

Hetta kemst av, at fólk ganga ikki so leingi við trupulleikum, áðrenn teir verða viðgjørdur og tá er viðgerðin bæði nógv lættari og skjótari og tað bøtir munandi um livimátan hjá teimum eldru, sigur Elin Lindenskov.

# Upp á tíðina at sjúklingar úr Føroyum fáa fleiri møguleikar

**– Tað er ein politisk avgerð, sum forðar fyri, at føroyingar, sum hava ávís sløg av krabbameini fáa tað bestu viðgerðina, sigur Mogens Egholm, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum**

HEILSUBÓT
*Áki Bertholdsen*



*Kanningar vísa, at í vissum førum er viðgerðin ímóti krabbameini betri í Noregi og í Svøríki enn á Ríkissjúkrahúsinum, so tað er upp á tíðina, at tann møguleikin verður kannaður, sigur Mogens Egholm, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum*

– Tað er upp á hægstu tíð, at føroyskir sjúklingar, sum hava tørv á viðgerð uttanlands, fáa aðrar møguleikar enn at verða sendir á Ríkissjúkrahúsið.

Tað heldur Mogens Egholm, yvirlækni á Landssjúkrashúsinum.

Seinastu tíðina hava kanningar víst, at viðgerðin fyri eitt nú ávís sløg krabbameini er betri í Noregi og Svøríki enn hon er í Danmark.

– Men sum støðan er í løtuni, ber ikki til at senda føroyskar sjúklingar aðrastaðni enn á ríkissjúkrahúsið, sigur yvirlæknin.

Landsstýrismaðurin í Almanna og heilsumálum, hevur boðað frá, at hann nú er at kanna, um tað ber til at geva føroyskum sjúklingum aðrar møguleikar, enn at verða sendir á Ríkissjúkrahúsið, ella til á onnur sjúkrahús í Danmarkar.

Hesum tekur yvirlæknin fult undir við.

– Tað er upp á tíðina, at hesin trupulleikin verður tikin upp, sigur hann.

Hann sigur, at hann fatar ikki, hví tað ikki skal bera at senda sjúklingar aðrastaðni, enn á Ríkissjúkrahúsi.

Men hann heldur seg kortini vita, hví tað ikki verður gjørt.

– Tá ið vit senda sjúklingar uttanlands, betalir føroyski landskassin fult gjald fyri allar kanningar og viðgerðir.

– Senda vit sjúklingarnar á Ríkissjúkrahúsið, verður viðgerðin goldin av eini serligari kontu til viðgerð uttanlands, men hetta er ein konto, sum er uttanfyri heilsuverkið.

– Men verða sjúklingar hinvegin sendir aðrastaðni, skal Heilsuverkið sjálvt betala, og tað ber ikki til við tí fíggjarkarmi, sum er.

Hann sigur, at fyri at fáa viðgerðina goldnað av kontuni til viðgerð uttanlands er tað sostatt ein treyt, at sjúklingurin verður sendur á Ríkissjúkrahúsið.

Hann skilir ikki, hví hetta er so. Men hetta má vera ein ella onnur merkilig politisk semja onkustaðni, sigur hann.

Hann sigur, at sostatt er tað bara heilt undantaksvís, at sjúklingar verða sendir aðrastaðni, enn á Ríkissjúkrahúsið.

## Betri møguleikar

Mogens Egholm sigur, at ber tað til at fáa betri viðgerð fyri ávísar sjúkur aðrastaðni enn á Ríkissjúkrahúsinum, eigur tann møguleikin avgjørt at verða troyttur, eitt nú í Noregi, Svøríki, Íslandi, sum eisini hevur eitt heilsuverkið, sum minst er á sama støði sum í Danmark, ella onkra heilt aðrastaðni.

Men talan kann eisini verða um onnur sjúkrahús í Danmark, enn Ríkissjúkrahúsið.

– Undir øllum umstøðum er støðan, sum hon er í løtuni, ógvuliga óheppin, tí nú hava vit ongar møguleikar enn Ríkissjúkrahúsið. Og umframt at viðgerðin har í ávísum førum ikki er so góð sum aðrastaðni, hevur Ríkissjúkrahúsið harafturat stórur trupulleikar við starvsfólkatroti. Og omaná alt kemur, at viðgerðirnar á Ríkissjúkrahúsinum eru avgjørt ikki bíligar.

– Tað eru nógv onnur sjúkrahús, har tað ber til at fáa viðgerð bíligari enn á Ríkissjúkrahúsinum. Men heldur ikki tann spurningurin er kannaður, tað kemst helst eisini av tí, at sum er, er føroyska heilsuverkið tvingað at senda sjúklingarnar á Ríkissjúkrahúsið.

Talan kann eitt nú verða um krabbameinssjúklingar, men eisini um aðrar sjúklingar og tað kann væl hugsast, at tað ber væl til at fáa góða ella betri viðgerð arðastaðni enn á Ríkissjúkrahúsinum og tað bíligari eisini.

Onkuntíð hevur eisini verið frammi um at senda krabbameinssjúklingar til Týsklands, men tað mælir yvirlæknin frá.

– Krabbameinsviðgerðin í Týsklandi, sum hugsað verður um, er ógvuliga umstrídd og dygdin í henni er ikki vísindaliga prógvað. Tað hevur eisini víst seg, at hjáárinini mangan eru so álvarslig, at doyggja sjúklingarnir ikki av krabbameini, doyggja teir av hjáárinunum.

Mogens Egholm sigur, at tær royndir hann hevur av hesi viðgerðini í Týsklandi, eru ikki góðar.

Fyri nøkrum árum síðani var júst sami spurningur umrøddur á Løgtingi. Tá mælti onkur tingmaður frá at senda sjúklingar til onnur lond, tí hann helt, at tað verður ov fremmand. Hann førdi fram, at tað sosiala umhvørvið hevur stóran týdning fyri grøðingina og tað umhvørvið er ikki aðrastaðni í sama mun sum í Danmark, har føroyingar skilja málið, hava vinfólk og skyldfólk og har sjúklingahotellið er?

– Tað eru sjónarmið, sum onki grundarlag er fyri at hava, tí kanningar um slík viðurskifti eru ikki gjørdar. Sjálvsagt kann tað vera høgligt hjá føroyingum at fara til Danmarkar, har teir duga málið, men tað er heldur ikki so trupult at skilja svenskt og norskt og tað tekur ikki langa tíð at ferðast úr Keypmannahavn til Malmø, fyri at taka eitt dømi, sigur Mogens Egholm. Hann heldur sostatt, at tað er dygdin í sjálvari viðgerðini, sum hevur størstan týdningin.



# Útoyggjafelagið farið til verka

**Útoyggjafelagið, sum her fyri varð stovnað, er farið til verka. fyribilsnevnd er vald, og farið er undir at fyrireika blaðútgávu, eins og fundarvirksemi verður fyrireikað**

ØKISMENNING
*Edvard Joensen*

Útoyggjafelagið hevur valt fyribilsnevnd, sum millum annað skal fyrireika aðalfundin, sum verða skal í mai. Eisini verður arbeitt við at velja økisnevndir og at geva blað út.

Í nevndini í Útoyggjafelagnum sita Óla Jákup úr Dímun, sum er formaður, umframt Katrinu Johannesen úr Mykinesi og Olgu Biskopstø úr Klaksvik.

Óla Jákup úr Dímun sigur, at felagið er eitt áhugafelag, har einstaklingar kunnu tekna seg sum lim. Men skipanin er soleiðis, at bert fólk, sum búgva á útoyggj og í Gásadali hava atkvøðurætt á fundum felagsins.

Tað fyrsta stóra tiltakið, sum nú fyriliggur, sigur formaðurin, verður at fara runt á ymsu støðini at seta á stovn økisráð og síðan at velja eitt umboð í umboðsráðið hjá felagnum. Hetta, ætlar hann, skal gerat í januar-februar.

Nevnt hevur verið, at ein skrivstova skal setast á stovn. Um tað sigur Óla Jákup úr Dímun, at hon verður helst ikki til nakað fyrr enn eftir aðalfundin í mai.

## Álitið

Løgmaður hevur fingið eitt álit frá útoyggjanevndini, sum sat, og hetta álit ætlar nýggja felagið at brúka sum grundarlag fyri sínum arbeiði. Mint eigur regluliga at verða aftur á tað, sum í hesum áliti stendur, sigur felagsformaðurin.

Hann heldur tað vera eitt gott hugskot, sum hevur verið frammi, at seta eitt fólk í fyrisitingini burtur av til at taka sær av útoyggjamálum.

Um ítøkilig mál, sum felagið fer at arbeiða við, nevnir formaðurin økisvinnuhúsini, sum fyrr hava verið frammi.

Tað er serliga matvørulógin, sigur hann, sum pressar á at fáa eitt slikt hús. Sum kunnugt er tað mest landbúnaður, sum smáplássini hava at liva av, og skal eitt nú matvørulógin haldast til fulnar, skal allur seyður flytast livandi til Hósvíkar at fletta.

Á Dímun er tað ógjørligt sum er. Skal tað gerast, skal tað vera við tyrlu,og so kostar tað beinanveg so nógv, at bíligari er at reka gonguna út av bakkanum.

Var hinvegin eitt lítið sláturvirki, sum kundi viðgjørt bæði seyð og fugl, í oynni, hevði borið til at hagreitt slíkt eftir fyriskriftunum, sigur dímunarbóndin.

Hann heldur annars, at eitt tilfeingi, sum gerast kann meira burtur úr, er fuglurin, sum flestu útoyggjarnar hava rímiliga væl av. Men aftur her er lokala vinnuhúsið ein fyrimunur, vísir hann á.



*Eitt vinnuhús á Dímun hevði bøtt væl um umstøðurnar til at hagreitt bæði seyð og fugl og kundi ivaleyst eisini givið betri úrtøku burturúr, heldur Óla Jákup úr Dímun, fomaður í Útoyggjafelagnum*

## Onnur vinna

Um feðravinnuna sigur formaðurin í Útoyggjafelagnum, at tað eru í grundini bara Koltur og Mykines, sum hava gjørt nakað mið-víst við ferðavinnu. Aðrastaðni verður lítið og einki gjørt, og á Dimun er púra einki.

Óla Jákuop úr Dímun digur, at tey hava við vilja valt ikki at satsa upp á ferðavinnu, tí tey meta seg ikki hava umstøður til tað. Tað skal fólk til at taka sær av ferðafólki, og tey eru vanliga rættiliga fáment í Dímun, sigur hann.

Um blaðið, sum felagið ætlar at geva út, sigur Óla Jákup úr Dímun, at Olga Biskopstø, nevdarlimur er farin undir at fyrireika fyrstu útgávuna. Talan verður helst um eitt heft tíðarrit, sum ætlandi skal koma út í mesta lagi eina ferð um mánaðan.

Spurningur hevur verið settur við, um tað er neyðugt við einum útoyggjafelag, tá eitt nú kommunufelag er frammanundan.

Til tað svara formaðurin, at Útoyggjafelagið og júst er stovnað sum eitt áhugafelag fyri einstaklingar, tí kommunurnar alment arbeiða saman í øðrum felag.

Mett varð, at skilagott er við slíkum felag, sum kann viðgera mál hjá myndugleikunum fyri limirnar, sum soleiðis fáa størri slagkraft, enn um tann eisntaki hvør í sínum lagi roynir at koma ígjøgnum, sigur Óla Jákup úr Dímun, formaður i Útoyggjafelagnum.

# Tungt hjá Lido Seafood

**Tað gongur tungt hjá fiskavirkinum Lido Seafood í Skálavík. Men at felagið skal vera farið í gjaldsteðg, avsannar nevndarformaðurin avgjørdur**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Lido Seafodd hevur tað strævið, men er ikki farið í gjaldsteðg, sigur nevndarformaðurin*

Einki arbeiði hevur verið á fiskavirkinum Lido Seafood í Skálavík síðan áðrenn jól. Søgur eru farnar at ganga um, at felagið er farið í gjaldsteðg, men tað avsannar nevndarfomaðurin, Jógvan Sundstein, avgjørt.

Hann váttar tó, at tað gongur tungt hjá felagnum at fáa tað at mala runt. Ymsir trupulleikar hava verið, og tað seinasta var, at virkið lá stilt einar tríggjar vikur í heyst, tí vatnið var ov skitið til matframleiðslu.

Bíðað hevur verið eftir reinsiverki, og farið varð aftur til arbeiðis einaferð í november. Síðan var nógv arbeiði fram í móti jólum, sigur Jógvan Sundstein. Men enn hevur gólvið ikki verið vátt í nýggja árinum.

Lido Seafood varð upprunaliga ætlað at gera lidnar døgurðarættir til útlendska marknaðin.

Men slíkt er kostnaðarmikið at byggja upp, sigur Jógvan Sundstein, og tá búskapurin koyrir tungt frammanundan, er ikki ráðiligt at brúka ov nógva tíð og pengar up á at »eksperimentera«, sum hann tekur til.

Tí valdu tey heldur at leggja seg eftir vanligari flakaframleiðslu, har alt varð fryst. Soleiðis fyri at royna at leggja botn og vinna eitt sindur av pengum, sum so møgulig kunnu brúkast til upprunaligu ætlaninar.

Virkið er tó útgjørt til tað, sum upprunaliga var ætlað, og verða ráð til tað, verður ivaleyst roynt aftur, sigur nevndarformaðurin.